


# Klaksvíkar kommuna avlop komandi ár



*Gongst sum tey, ið ráða fyri borgum í Klaksvík, ætla, fer kommunan at hava eitt avlop upp á 4,73 milj. kr. komandi ár*

*(Mynd: Rúna Sivertsen)*




KOMMUNUTÍÐINDI
*Rúna Sivertsen*

Á býráðsfundi týskvøldið samtykti Klaksvíkar býráð endaliga fíggjarætlanina fyri 2003.

Fíggjarnevndin mætli býráðnum til at samtykkja eitt uppskot, sum javnvigar við einum avlopi uppá 4,73 milj. kr.

Skattaprosentið í Klaksvíkar kommunu verður óbroytt komandi ár, 20%. Somuleiðis verður barnafrádrátturin hin sami, 3.500 kr.















# 2.568 undirskriftir móti skrásettum parlagi

**Álvur Kirke hevði 2.568 undirskriftir við til Høgna Hoydal. Undirskriftirnar fáa tó ikki landsstýrismannin at broyta støðu ella ætlan**

UNDIRSKRIFTIR
*Heri á Rógvi*

Álvur Kirke handaði hósmorgunin landsstýrismanninum í lógarmálum, Høgna Hoydal, tær 2.568 undirskriftirnar, hann hevur savnað saman kring landið.

Endamálið við innsavningini var at mótmæla lógaruppskotið um skrásett parlag, sum landsstýrismaðurin hevur í hyggju at leggja fyri tingið í sambandi við yvirtøkuna av persóns-, familju- og arvarætti.

Álvur Kirke tók stigið til innsavningina av sínum eintingum. Hann nevnir í yvirlýsing í sambandi við innsavningina millum annað, at samfelagið í Føroyum hevur og skal byggja á kristna siðalæru, og eftir hansara tykki var hendan humanistiska bylgjan, sum ein stórur partur av føroya fólki sigur seg taka undir við, av reinum heidnu slag.

Upprunaliga var ætlanin, at undirskriftirnar skuldu latast Løgtingið, men løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, helt, at tað hóskaði seg betur at lata landsstýrismanninum við málsøkinum undirskriftirnar.

Høgni Hoydal segði seg fara at lesa tilfarið frá Álvi Kirke og lata Løgtinginum eitt avrit.

## Lítið at siga

Lagið var gott á monnum í Tinganesi hósmorgunin, og tað vórðu eingin illfýsin orð søgd millum Høgna Hoydal og Àlv Kirke. Báðir vístir teir á, at ein rættur í einum demokratiskum samfelagi er at geva til kennar sína hugsanir.

Hvørki Høgni ella Álvur fara at broyta støðu eftir hetta átakið.



*Àlvur Kirke handar her Høgna Hoydal undirskriftirnar, hann hevur savnað inn móti skrásettum parlagi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

—Ætlanirnar hjá mær eru framvegis óbroyttar. Eg ætli fyrst og fremst at fáa málið niðan í tingið til eitt aðalorðaskifti, sigur Høgni Hoydal.

Álvur Kirke segði seg rokna við móttøkuna frá landsstýrismanninum, sum hevur verið millum heitastu talsmenn fyri at loyva skrásettum parlagi grundað á sjónarmiðið um persónligt frælsi og ikki at gera mismunn á fólki.

—Eg hevði roknað við hesari móttøkuni. Hetta kann í øllum førum styrkja politikarar við somu fatan sum eg, at tað eru nógv, ið hava sama sjónarmið, sigur Álvur Kirke.

Hann letur sum heild væl at innsavningini. Kortini kundu tað gott verið fleiri undirskriftir, heldur hann fyri.

Pappírini, har fólk hava havt møguleikan at skriva undir, hava ligið ymsastaðni runt í landinum. Eitt nú á bensinsølum, í samkomum og við at senda ein seðil, ið hevur staðið í bløðunum.

Àlvur Kirke sigur, at størsti parturin av undirskriftunum er komin frá samkomum.

Ein innsavning av hesum slag er í roynd og veru ein úttrykkjan av sjónarmiðum. Tað konkreta virðið er ivasamt. Harumframt kann innsavnarin ikki siga, at hann hevur eftirkannað hvørt einstakt navn, og tí skal talið takast við einum ávísum fyrivarni.

# 250 kr. t/r

**Spurningurin, flest øll vágafólk og allar føroyingar hava ivast í seinastu tíðina, varð hósmorgunin svaraður: prísurin fyri at koyra gjøgnum Vágatunnilin. 250 kr t/r verður vanligi prísurin fyri ein vanligan bil, men harumframt eru eisini gjørdar avsláttarskipanir til tey, ið koyra ofta**

VÁGATUNNILIN
*Heri á Rógvi*

Stjórin fyri P/F Vágatunnilin, Dávur Reinert Hansen, kundi hósmorgunin kunngera fyri øllum, hvør prísurin fyri at ferðast undir Vestmannasundi í Vágatunnilinum fer at verða.

Gjørd er ein prísskrá, sum býtir akførini upp í støðd og gevur alsláttur eftir túratali. 250 kr t/r verður kostnaðurin fyri ein vanligan persónbil. Gjaldast skal vágamegin fyri báðar vegir í einum. Akfør undir seks metrar fáa avsláttur á tann hátt, at fimm túrar kosta 1.000 kr. t/r, og 3.000 kr. t/r fyri tjúgu vitjanir í Vágum ella á Stykkinum.

Næsti bólkur eru akfør, sum til longdar eru millum 6 og 12,4 metrar. Hesi gjalda 1.440 kr. t/r. Eftir avsláttarskipanini skal gjaldast 5.760 fyri fimm túrar og 17.280 fyri 20.

Síðsti og dýrasti bólkurin eru akfør størri enn 12,4 metrar til longdar. Hesi akfør gjalda 2.160 kr. fyri ein vanligan t/r. Við avsláttri kunnu fimm túrar fáast fyri 8.640 kr. t/r. 25.920 kr. geva 20 túrar t/r fyri eitt akfar størri enn 12,4 til longdar.

Viðmerkjast skal, at prísurin í hvørjum einstøkum føri er talan um eitt akfar. Tað merkir, at talið av ferðandi er einki sigandi í mun til prís. Og tá er tað líkamikið, um talan er um ein buss ella persónbil.

Sí annars lýsing á síðu trý við prístalvu.

## Kubbi

Fólk, ið ynskja at gera sær dælt av avsláttarskipanini, mugu ognar sær tann sokallaða kubban. Hesin fæst við at gjalda 300 kr. í depositum. Skalt tú fáa avsláttur, mást tú fylla á fyrst. t.e. tú skalt eitt nú gjalda 25.920 kr. fyri tjúgu túrar hjá einum stórum trailara, áðrenn tú hevur koyrt.

Ein elektronisk skipan lesur av á kubbanum, sum verður lagdur í rutin í bilinum, hvussu nógv "klipp" tú hevur eftir.

Annars ber bert til at gjalda fyri gjaldskortið, t.e. FR-korti ella øðrum. Hevur tú einki tílíkt, ber til at fáa eitt uppkrav, sum skal gjaldast sum skjótast.




*Dávur Reinert Hansen kunngerð, hvørji prísirnir um Vestmannasund verða í framtíðini. Talan er um dýrari prísir fyri hvørt akfar í mun til Strandferðsluna. Munandi avsláttur kunnu fáast við at keypa 5 ella 20 túrar í einum.*

## Góðar tíðir – ringar tíðir

Prísirnir hevur nevndin og leiðslan í P/F Vágatunnilin ásett eftir nøkrum metingum og skyldum, felagið hevur.

Felagið skal gjalda eitt lán aftur áljóðandi 120 mió. umframt rentur. Hendan útreiðsla verður mett til umleið. 12 mió kr. árliga. Samlaða inntøkan, skal tunnilin bera seg, verður mett til 20 mió kr. Restin, 8 miiliónir, fara til rakstur av tunnilinum og fyri at standa ímóti "ringum tíðum".

—Seinastu 15 árini hevur stórur munur verið á ferðsluni fyri hvørt árið. Vit hava roknað við einari ferðslu við 350 bilum um samdøgrið, sigur Dávur Reinert Hansen.

Nevndarformaðurin, Klæmint Weihe, greiddi frá, at teir hava ikki torað at koyrt prísirnar longur niður.

—Gongdin vil so vísa, um príslegan kann haldast, sigur Klæming Weihe. Hann vísur á, at alt eftir gongdini kunnu prísirnir hækka ella lækka. Arbeitt verður sjálvandi fram ímóti, at prísirnir ikki hækka.

Eftir fimtan árum skuldi lánið verið afturgoldið hjá Vágatunnilinum, og tá verður tunnilin latin til landið at umsita.

Vágatunnilin letur upp fyri ferðslu 10. desember við galdandi prísum.

*Lesið meira um málið, á síðu 32 og síðu 36*

| Støðd | Prísur 1 túr t/r | 5 túrar t/r | 20 túrar t/r |
|---|---|---|---|
| Akfør undir 6 m | 250,- | 1000,- | 3000,- |
| Akfør 6 - 12.4 m | 1440,- | 5760,- | 17280,- |
| Akfør yvir 12.4 m | 2160,- | 8640,- | 25920,- |